# Brøndby er væl fyri

**Todi Jónsson spældi allar 90 minuttirnar, tá FCK vann týdningarmiklan sigur í Jyllandi**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*



*Johan Byrial Hansen hevur ikki fingið nakra dystarvenjing á besta OB-liðnum higar til í hesum kappingarárinum*

Tað er øgiligt at fáa oyruni í væl smurdu fótbóltsmaskinuna hjá Brøndby. Christian Høgni Jacobsen er ikki enn komin á besta liðið hjá Esbjerg, men kanska verður tað ikki so leingi. At hann ikki var við sunnudagin, man hann leggja lítið í.

Esbjerg hevði vitjan av Brøndby. Tað savnaði 9.334 áskoðarar. Hetta var størsta talið sunnudagin. Brøndby vann 7–0, og tað sigst vera størsti útisigurin í søguni hjá tíggju ára gomlu superliguni.

Søgan var næstan sum tá B71 næstsíðsta sunnudag á heimavølli legði rygg til 5–0 tap ímóti B68. Í 1. hálvleiki fekk Brøndby trý mál. Kortini var tað Esbjerg, sum hevði bóltin mest. Brøndby hevði fýra málmøguleikar, og teir skoraðu trý mál!

### Estlendingar gera um seg

Í Vejle vóru 4.306 áskoðarar. Teir sóu, at AaB er væl fyri. Gestirnir vunnu 3–1. Øll málini hjá teimum vórðu skorað av estlendskum landsliðsspælarum. Andres Oper skoraði tvær ferðir, og Indrek Zelinski skoraði eitt mál.

AaB er saman við Brøndby á odda í superliguni, meðan Vejle savnar sítt stríð um at halda seg omanfyri niðurflytingarstrikuna.

Mest umrødda felagið í Danmark síðstu vikurnar hevur verið Lyngby. Spælararnir og venjarin hava í orðsins rætta týdningi ikki vitað, um teir hava verið keyptir ella seldir. Felagið eigur ongar pengar, og Farum borgarstjórin, Peter Brixtofte, vil so fegin flyta superliguliðið til sín bý, sítt felag og sítt stadion.

Men á vøllinum hilnast eftir umstøðunum væl hjá Lyngby. Teir eru einasta felagið í superliguni, sum ikki hevur tapt, nú seks dystir eru spældir. Sunnudagin høvdu teir vitjan av verjukenda Viborg, og bæði liðini vóru nøgd við 2–2 javnleikin.

### Todi er við aftur

Sæð við føroyskum eygum var mest spennandi dysturin í superliguni í Silkeborg, har heimaliðið er illa fyri, eftir at teir hava selt fleiri av bestu spælarunum.

FCK hevur áður ofta havt tað trupult í Jyllandi, men tað tykist vera ein farin tíð. Dysturin var ikki serliga væl spældur, men FCK vann 2–0. Christian Poulsen í 64. og Niclas Jensen í 87. minutti skoraðu málini.

Todi Jónsson var á vøllinum allar 90 minuttirnar og fekk harvið týdningarmikla dystarvenjing. Skoðsmálið, sum hann fær í donsku miðlunum, er um miðal, ella tað sama, sum flestu liðfelagarnir fáa. Todi hevði ikki nakran serligan upplagdan møguleika.

Zuma var ikki á FCK liðnum hesa ferð, og Heine Fernandez var heldur ikki við. Álopsfelagið hjá Toda var Morten Bisgaard, sum er ein av spælarunum, sum FCK hevur keypt í summar. Bisgaard hevði fleiri møguleikar at skora mál, men hann var ikki nóg avgjørdur.

Tað er sjáldan, at FCK spælir frammanfyri bara 2.192 áskoðarum.

### Eingin Johan

Í Odense møttu 4.380 áskoðarar til útidystin ímóti FCM. Útiliðið skoraði í 6. og 31. minutti. OB fekk einki mál. Teir spældu í ein tíma við tíggju monnum, tí Andrew Rembo varð rikin av vøllinum.

Í hesi vikuni kemur Johan B. Hansen til Føroya at vera við í tveimum landsdystum. Hann fær ikki dystarvenjing á besta liðnum hjá OB.

Tað sigst í donskum fjølmiðlum, at ein av liðfeløgunum hjá Toda, Thomas Thorninger, kanska er á veg til FCM. Sáttmálaskeiðið hjá honum í FCK er liðugt á nýggjárinum. Spælarin ásannar, at hann hevur tosað við samanlagda jyska felagið, men honum dámar væl at vera í FCK, og tí kann tað framvegis hugsast, at hann verður verandi liðfelagi hjá Toda – um leiðslan í FCK er áhugað í tí.

Bara 1.728 áskoðarar vóru í Gladsaxe, har AGF tvífaldaði um stigatalið – úr einum og upp í tvey. Keðiligi dysturin endaði málleysur. Komandi vikuskifti verður ikki spælt í superliguni. Sum alla aðra staðni í Europa, so eru HM undankappingar dystir á skránni í Danmark.

# Jákup framvegis á beinkinum

**Molde var best, tá teir á útivølli vunnu føroysku uppgerðina í norskum fótbólti**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Tað eru tvey føroysk feløg í norskum fótbólti. Annað er Sogndal, og hitt er Molde. Kurt Mørkøre er sáttmálabundin at Sogndal, og Jákup Mikkelsen er sáttmálabundin at Molde. Sunnudagin skoraði Kurt Mørkøre eitt mál. Men tað var í Klaksvík. Sum kunnugt er hann útleigaður úr Sogndal og til KÍ inntil síðst í næsta mánað.

Uppgerðin á heimavøllinum hjá Sogndal, Fosshaugene, var púra uttan føroyska luttøku. Hóast Jákup Mikkelsen í landsdystinum ímóti Jugoslavia var ein sannur brandur, so er í løtuni ikki pláss fyri honum í Molde málinum. Har standur 23 ára gamli Knut Lillebakk, sum í fleiri ár hevur bíðað eftir møguleikanum á besta liðnum. Nú hevur hann fingið møguleikan, og higartil hava úrslitini verið góð.

Sunnudagin vann Molde 4–3 í Sogndal. Í dagblaðnum VG fær málverjin eitt fýra tal. Hetta er sama skoðsmálið, sum flestu av liðfeløgunum eisini fáa.

Stóri maðurin hjá Molde var U–21 landsliðsmaðurin Magnus Hoseth. Hann skoraði trý mál. Molde var á odda 2–0, tá tíggju minuttir vóru farnir, og teir høvdu fleiri møguleikar at økja um leiðsluna. Men heimaliðið javnaði undan hvíldini. Í 2. hálvleiki eydnaðist tað Molde at økja tvær ferðir, meðan Sogndal bara svaraði aftur eina ferð – tá tað restaðu fýra minuttir.

### Langar bóltar

Besti spælarin hjá Sogndal eitur Tommy Øren. Tá Kurt var í felagnum, var Tommy Øren vandamikil álopsspælari, men hann hevur ikki spælt í nógvum teimum seinastu umførunum. Tá Sogndal fyrr í summar spældi ímóti Molde, breyt Tommy Øren beinið. Tá varð nógv skrivað um øgiligu taklingina frá Odd Inge Olsen. Hesin fyrrverandi liðfelagin hjá Jákupi Mikkelsen er fyri stuttum seldur til Rosenborg.

Tommy Øren verður tøkur aftur síðst í september – um sama mundið sum tá Kurt Mørkøre verður tøkur aftur hjá Sogndal. Sunnudagin helt Tommy Øren ikki nógv um spælið hjá sínum liðfeløgum:

– Teir sparkaðu alt ov nógvar langar bóltar. Tað ger at góðu fótbóltsspælararnir ikki sleppa upp í part, staðfesti hann.

Hjá Molde gekk tað meiri fyri seg á jørðini.

### Deyðu bóltarnir

Svenski venjarin hjá Molde, Gunde Bengtsson, helt í síðstu viku, at um liðið hjá honum ikki hevði havt lorkað so nógv mál ígjøgnum í sambandi við deyðbóltsstøður, so høvdu teir kanska verið fremst í tippuliguni.

Hann segði seg hava skrásett, at av 31 málum, sum vóru farin ígjøgnum, vóru 22 skorað eftir deyðbóltsstøður – fríspørk (13), hornaspørk (4), innkast (3) og brotsspørk (2). Venjarin vísti serliga á øll málini, sum vóru skorað í sambandi við fríspørk:

– Tað tykist sum um spælararnir eru so bangnir fyri at gera mistøk, at tað næstan ikki slepst undan mistøkum, helt venjarin. Tá hann undan næstsíðsta umfari gjørdi av at skifta málverja, segði hann tað vera, at tað hevði ikki eydnast við Jákupi sum málverja at rætta upp á keðiligu gongdina í sambandi við deyðbóltarnar.

Einki bendir kortini á, at veikleikin er burtur. Tvey av teimum trimum málunum, sum Sogndal fekk, komu í sambandi við deyðar bóltar. Tað fyrsta fingu teir eftir langt innkast, og teir javnaðu til 2–2 við frísparki dygst uttanfyri brotsteigin. Bólturin tók í manngarðin og snýtti málverjan. Triðja málið fekk Sogndal eftir langt innlegg til handara stólpan.



# Hull tapir ikki

Julian Johnsson hevur síðani 1. juli verið sáttmálabundin at Hull Citu í triðbestu ensku deildini, og enn hevur føroyski landsliðsleikarin ikki roynt at tapt við nýggja liði sínum. Heldur ikki hóast fleiri venjingardystir hava verið móti liðum, sum er stødd ovarligari enn Hull.

Um vikuskifti spældi Hull málleysan javnleik á heimavølli, men hóast tað altíð er got at halda málið reint, so eru tey í Hull ikki heilt nøgd við úrslitið. Sigrar skulu til, um ætlaða uppflytingin skal gerast veruleiki, men enn hevur talan bert verið um ein sigur.

Framvegis eru tó nógvir dystir eftir at spæla, so Hull hevur allar møguleikar at vinna seg longu upp eftir á stigatalvuni.

*-jm*



# Flúgvandi í Hollandi

Tvey umfør eru nú leikt av kappingini í næst bestu hollendsku deildini, har Súni Olsen og Zwolle aftur í ár miðja móti einari uppflyting til bestu deildina.

Leygardagin var um reppið, at Zwolle misti stig, tá teir á heimavølli spældu móti Telstar. Tveir minuttir fyri leiklok javnaði Telstar leiðsluna, sum Zwolle hevði vunnið sær í fyrra hálvleiki, men minuttin eftir eydnaðist kortini hjá Zwolle at avgera dystin.

Súni Olsen spældi seinastu sjey minuttirnar av dystinum.

*-jm*

## Støðan, danska superligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby | 6 | 5 - 0 - 1 | 21 | 2 | 19 | 15 |
| 2 | AaB | 6 | 5 - 0 - 1 | 12 | 6 | 6 | 15 |
| 3 | FCK | 6 | 3 - 1 - 2 | 9 | 6 | 3 | 10 |
| 4 | Lyngby | 6 | 2 - 4 - 0 | 7 | 4 | 3 | 10 |
| 5 | FCM | 6 | 2 - 3 - 1 | 9 | 6 | 3 | 9 |
| 6 | AB | 6 | 2 - 2 - 2 | 7 | 6 | 1 | 8 |
| 7 | Vejle | 6 | 2 - 2 - 2 | 10 | 11 | -1 | 8 |
| 8 | Viborg | 6 | 1 - 3 - 2 | 7 | 8 | -1 | 6 |
| 9 | OB | 5 | 2 - 0 - 3 | 4 | 7 | -3 | 6 |
| 10 | Esbjerg | 5 | 1 - 1 - 3 | 4 | 13 | -9 | 4 |
| 11 | AGF | 6 | 0 - 2 - 4 | 1 | 10 | -9 | 2 |
| 12 | Silkeborg | 6 | 0 - 2 - 4 | 2 | 13 | -11 | 2 |

## Støðan, danska 1. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Frem | 5 | 4 - 1 - 0 | 12 | 4 | 8 | 13 |
| 2 | Køge | 5 | 4 - 1 - 0 | 8 | 2 | 6 | 13 |
| 3 | Farum | 5 | 3 - 1 - 1 | 13 | 9 | 4 | 10 |
| 4 | HFK Sønderj. | 5 | 3 - 1 - 1 | 11 | 7 | 4 | 10 |
| 5 | Herfølge | 4 | 2 - 2 - 0 | 7 | 4 | 3 | 8 |
| 6 | B93 | 5 | 2 - 1 - 2 | 12 | 9 | 3 | 7 |
| 7 | AC Horsens | 5 | 2 - 1 - 2 | 4 | 3 | 1 | 7 |
| 8 | Randers F. | 5 | 2 - 1 - 2 | 6 | 6 | 0 | 7 |
| 9 | Brønshøj | 5 | 2 - 1 - 2 | 9 | 11 | -2 | 7 |
| 10 | FC Aarhus | 5 | 1 - 3 - 1 | 8 | 8 | 0 | 6 |
| 11 | Skive | 5 | 1 - 2 - 2 | 7 | 9 | -2 | 5 |
| 12 | B 1913 | 5 | 1 - 1 - 3 | 6 | 8 | -2 | 4 |
| 13 | B 1909 | 5 | 1 - 1 - 3 | 6 | 14 | -8 | 4 |
| 14 | Hvidovre | 4 | 0 - 2 - 2 | 5 | 8 | -3 | 2 |
| 15 | Fredericia | 5 | 0 - 2 - 3 | 6 | 11 | -5 | 2 |
| 16 | Kolding IF | 5 | 0 - 1 - 4 | 6 | 13 | -7 | 1 |

## Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg | 20 | 13 - 5 - 2 | 58 | 24 | 34 | 44 |
| 2 | Lillestrøm | 19 | 13 - 3 - 3 | 48 | 25 | 23 | 42 |
| 3 | Viking | 20 | 12 - 5 - 3 | 37 | 21 | 16 | 41 |
| 4 | Brann | 20 | 11 - 4 - 5 | 55 | 33 | 22 | 37 |
| 5 | Molde | 20 | 10 - 4 - 6 | 43 | 34 | 9 | 34 |
| 6 | Stabæk | 20 | 11 - 1 - 8 | 37 | 33 | 4 | 34 |
| 7 | Odd. Grenl. | 19 | 9 - 4 - 6 | 36 | 26 | 10 | 31 |
| 8 | Moss | 20 | 8 - 1 - 11 | 29 | 37 | -8 | 25 |
| 9 | Lyn | 20 | 5 - 7 - 8 | 35 | 37 | -2 | 22 |
| 10 | Sogndal | 20 | 6 - 4 - 10 | 32 | 47 | -15 | 22 |
| 11 | Bodø/Glimt | 20 | 4 - 7 - 9 | 29 | 37 | -8 | 19 |
| 12 | Strømgodset | 20 | 3 - 6 - 11 | 33 | 61 | -28 | 15 |
| 13 | Tromsø | 20 | 4 - 1 - 15 | 16 | 41 | -25 | 13 |
| 14 | Bryne | 20 | 3 - 2 - 15 | 20 | 52 | -32 | 11 |

## Støðan, hollendska toto-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ADO Den Haag | 2 | 2 - 0 - 0 | 6 | 1 | 5 | 6 |
| 2 | FC Zwolle | 2 | 2 - 0 - 0 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 3 | BV Veendam | 2 | 2 - 0 - 0 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 4 | RBC Roos'daal | 2 | 1 - 1 - 0 | 4 | 2 | 2 | 4 |
| 5 | Cambuur/L. | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 1 | 2 | 4 |
| 6 | Heracles A. | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 7 | Excelsoir | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 8 | Dordrecht '90 | 2 | 1 - 0 - 1 | 4 | 3 | 1 | 3 |
| 9 | Volendam | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 10 | Top/Oss | 2 | 1 - 0 - 1 | 3 | 4 | -1 | 3 |
| 11 | Eindhoven | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 12 | Haarlem | 2 | 0 - 1 - 1 | 2 | 4 | -2 | 1 |
| 13 | Helmond Sp. | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 3 | -2 | 1 |
| 14 | G.A. Eagles | 2 | 0 - 1 - 1 | 2 | 6 | -4 | 1 |
| 15 | Emmen | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 16 | Storm/Telstar | 2 | 0 - 0 - 2 | 2 | 5 | -3 | 0 |
| 17 | MVV | 2 | 0 - 0 - 2 | 2 | 6 | -4 | 0 |
| 18 | VVV | 2 | 0 - 0 - 2 | 2 | 6 | -4 | 0 |

Perioduvinnarnari eru merktir »+«

## Støðan, enska 3. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Bristol R. | 3 | 3 - 0 - 0 | 6 | 3 | 3 | 9 |
| 2 | Southend | 3 | 2 - 1 - 0 | 5 | 1 | 4 | 7 |
| 3 | Rochdale | 3 | 2 - 1 - 0 | 5 | 3 | 2 | 7 |
| 4 | York | 3 | 2 - 0 - 1 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 5 | Luton | 3 | 2 - 0 - 1 | 6 | 4 | 2 | 6 |
| 6 | Darlington | 3 | 2 - 0 - 1 | 4 | 2 | 2 | 6 |
| 7 | Shrewsbury | 3 | 2 - 0 - 1 | 3 | 3 | 0 | 6 |
| 8 | Kidderm. | 3 | 2 - 0 - 1 | 2 | 2 | 0 | 6 |
| 9 | Hull | 3 | 1 - 2 - 0 | 3 | 1 | 2 | 5 |
| 10 | Mansfield | 3 | 1 - 2 - 0 | 4 | 3 | 1 | 5 |
| 11 | R&D | 3 | 1 - 2 - 0 | 1 | 0 | 1 | 5 |
| 12 | Lincoln C. | 3 | 1 - 1 - 1 | 4 | 2 | 2 | 4 |
| 13 | Hartlepool | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 4 | 1 | 4 |
| 14 | Swansea | 3 | 1 - 1 - 1 | 3 | 4 | -1 | 4 |
| 15 | Halifax | 3 | 1 - 1 - 1 | 4 | 6 | -2 | 4 |
| 16 | Scunthorpe | 3 | 1 - 0 - 2 | 5 | 3 | 2 | 3 |
| 17 | Leyton O. | 3 | 0 - 2 - 1 | 2 | 3 | -1 | 2 |
| 18 | Macclesfield | 3 | 0 - 2 - 1 | 2 | 4 | -2 | 2 |
| 19 | Carlisle | 3 | 0 - 2 - 1 | 0 | 2 | -2 | 2 |
| 20 | Cheltenham | 3 | 0 - 1 - 2 | 4 | 6 | -2 | 1 |
| 21 | Oxford Utd. | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 3 | -2 | 1 |
| 22 | Plymouth | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 3 | -2 | 1 |
| 23 | Exeter | 3 | 0 - 1 - 2 | 2 | 8 | -6 | 1 |
| 24 | Torquay | 3 | 0 - 0 - 3 | 0 | 5 | -5 | 0 |